# Vinnudagurin - komin fyri at vera

*Fríggjadagin vóru topparnir í føroyskum vinnulívið savnaðir í Norðurlandahúsinum til vinnudag. – Dagurin varð sera væl móttikin, tí vinnulæívsfólk hava eisini tørv at hittast til annað enn arbeiðsbólkar, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sum fyrireikaði dagin. Og stjórin er ikki bangin fyri at viðganga, at vinnudagurin er komin fyri at vera*



*Teir lurta við áhuga. Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, Finnbogi Arge, landsstýrismaður við vinnumálum og Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, meðan Asger Aamund, danskur vinnulívsmaður sigur nøkur vísdómsorð ...*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

SVEINUR TRÓNDARSON

– Tá eg hyggi út yvir fjøldina, veit eg ikki um eg torið at siga nakað, tí tey, sum sita her, vita alt, sum eg havi hug at tríva í, segði landsstýrismaðurin í Vinn-umálum, Finnbogi Arge, tá hann tók orðið í Norðurlandahúsinum vinnudagin.

Og taka vit hann upp á orðið, so vóru møguleikarnir til staðar.

Vinnudagur var, og so at siga alt, sum kundi krúpa og ganga, og sum hevur við vinnu at gera, var at síggja í Norðurlandahúsinum.

Og alt hetta gevur Jan Mortensen, stjóra í Vinnuhúsinum ábendingar um, at tankin við degnum er náddur og tiltakið eydnaðist væl.

– Tað tykist annars vera torført, at kasta seg út í felagsarbeiði, tí tað er tíðarkrevjandi. Men fyrimunirnir við tí verða gloymdir, sigur Jan Mortensen, sum vísir á evropeiska havbúnaðarfelagið, sum dømi.

– Har sita nógv lond og avgera tað, sum fyriferst innan alivinnuna, men føroyingar eru ikki við. Avgerðirnar flúgva omanfyri høvdið á okkum og vit sita ikki við tað borðið, har tær vera tiknar, sigur hann.

Tað er ein fatan av, at vit hava nóg mikið við okkum sjálvi, og tí tíma vit ikki at brúka tíð til nakað annað.

– Tað er eitt av endamálunum við hesum degnum, at vit skulu brúka tíð saman og harvið eisini fáa impulsir frá øðrum. Tað gevur kanska áræði til at fara víðari, sigur Jan Mortensen.

– Tú kanst siga, at tað er ein roynd at skap eitt vinnuumhvørvi í Føroyum, leggur hann afturat.

Stjórin í Vinnuhúsinum staðfestir, at tann fyrst vinnudagurin eydnaðist væl, og at hann heldur fram.

– Tað er einki at ivast í, at vit gera tað aftur næsta ár, og so fáa vit at síggja, um tað skal halda á júst soleiðis. Dagurin var bygdur upp um at ársins virkið skuldi kjósast, men um tað verður leisturin framyvir ber ikki til at siga nú.

Hugskotið við ársins virkið heldur eisini fram, men heldur ikki tað er avgjørt, um tað verður júst á henda hátt.

Nógvir fyrilestrar vórðu hildnir og tað hevur givið teimum nógvu áhoyrarunum gott at byggja víðari á.

– Vit góvu fyrilestrarhaldarunum nøkur evni, sum teir røddu um og tað eru vit sera væl nøgd við, tí har vóru nógvir áhugaverdir fyrilestrar. Asgar Aamund er sera áhugaverdur at lurta eftir, tí hann hevur drúgvar royndir.

– Meiningarnar kunnu vera kontantar, men hann hevði ein greiðan boðskap at bera, til dømis um samanhangin millum evropeiska vinnulívið og politisku skipanina í ES. Tað var sera áhugavert, men tað var tann parturin um okkara støðu, sigur Jan Mortensen, stjóri.

Sosialurin var við til vinnudagin, og vit fara í komandi bløðum, at gera meira við onkrar av fyrilestrunum, sum vóru hildnir fríggjadagin



*Teir tóku lógvatak fyri at fáa dagin upp at standa Vilhelm M. Johannesen og Jan Mortensen og væl eydnaðist ...*

**Mynd : Jens Kristian Vang**




*Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni, helt ein sera áhugaverdan fyrilestur um framtíðina uttan ein heimamarknað*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



# – Eitt herðaklapp til okkum øll

*– Øll, bæði bygdin og starvsfólkið, eru errin av, at Havsbrún, sum tað fyrsta virkið nakrantíð varð kosið sum ársins virkið í Føroyum, sigur Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún. – Vit taka tað, sum eina viðurkenning fyri tað íkast, sum vit geva samfelagnum, sigur Bergur Poulsen, stjóri*



*Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum handar Bergi Poulsen skjalið sum sigur, at Havsbrún er »Ársins virkið 2000«*

**Mynd: Jan Müller**

SVEINUR TRÓNDARSON

Sum fyrsta føroyska virkið nakrantíð, vað Havsbrún fríggjadagin kosið sum ársins virkið. Bergur Poulsen, stjóri, tók móti heiðrinum, og hann er errin um, at hansara virkið er vorðið tað fyrsta í røðini.

– Vit taka tað, sum eina viðurkenning fyri tað íkast, sum vit geva samfelagnum, bæði lokalsamfelagnum og tí stóru heildini, sigur hann.

Býurin og virkið eru tætt knýtt at hvør øðrum og tað er ikki sørt, at fuglfirðingar eru ernir av, at júst teirra virkið var kosið.

– Tað hevur ávísan týdning fyri bygdina og fyri starvsfólkið, og tað gevur einum áræði at halda á, sigur hann.

### Gloyma týdningin vinnulívið hevur

Stjórin á Havsbrún sigur við Sosialin, at hann er fegin um hetta nýggja tiltakið.

– Vit hava lyndið til at gloyma týdningin, sum vinnulívið hevur fyri føroyska samfelagið og tað er galdandi fyri vinnuna sjálva, men so sanniliga eisini fyri fjølmiðlarnar. Eg haldi, at tað er ov lætt at klikkja niður á vinnulívið, tá tað ikki gongur nóg væl og gloyma tað, tá tað gongur væl, sigur Bergur.

Vinnan er týdningarmikil partur av føroyska samfelagnum og tað eigur at vera virðismett eitt sindur hægri, heldur hann.

Fleiri styttri fyrilestrar vórðu hildnir og m. a. segði Finnbogi Arge landsstýrismaður, at vinnan eftir hansara tykki blandar seg alt ov lítið upp í samfelagskjakið. Hesum er Bergur Poulsen lutvíst samdur við honum í.

– Tað er rætt. Sjálvandi skal vinnan blanda seg, men tað skal ikki vera so, at hon alla tíðina rópar um alt, sum rørir seg. Tað skal gerast seriøst og við skili. Búskapar- og vinnupolitikkin haldi eg saktans, at vinnan kann tosa við um, men so eru eisini onnur meira viðkvom mál, sum vinnan ikki eigur at nerta, sigur Bergur Poulsen.

### Úr vøggu í grøv

Tá fólk hoyra navnið Havsbrún munnu tey flestu hugsa um lýsi og fiskamjøl, men hóast tað er ein stórur partur av virkseminum, so er Havsbrún eisini annað enn tað.

– Vit hava altíð tykist við hasi virkisøkini, men takast við so øgiliga nógv annað enn tað eisini, sigur Bergur.

Hann vísir á, at teir eisini hava skip og eru við í laksaframleiðslu frá smolti til lidna vøru.

Men høvuðsøkið er og verður framleiðslan, sum virkið byrjaði við, men tað er eisini ein neyðugur partur.

Havsbrún er ein av teimum stóru fóðurframleiðarunum, og tann framleiðslan er jú alneyðug skal lív haldast í alivinnuni.

*Men er tað kortini ikki at ganga ímóti tíðini, at brúka fisk, sum kann brúkast til matna, til mjøl, lýsi og fóður?*

– Vit hava roynt at virka svartkjaft til matna, men tann framleiðslan var ikki burðardygg. Tað er ikki óhugsandi, at vit fara at royna tað aftur, men tann framleiðslan, sum vit hava nú, er burðardygg og tað er tørvur á henni. So eg haldi ikki at tað er at fara ímóti tíðini, sigur Bergur Poulsen, sum leggur afturat, at tað ikki longur verður kallað ídnaðarfiskur, men fóðurfiskur.

### Jøvn menning

Tá vit spyrja Berg um málsetningin fyri virkið sigur hann, at høvuðsmálsetningurin er at hava eina javna menning av virkinum soleiðis, at tað alla tíðina er kappingarført.

– Vit royna alla tíðina at betrað um tað vøruútboðið, sum vit hava. Vit hava ikki havt fyri neyðini, at fara í holt við nýggjar framleiðslur, men hava harafturímóti roynt at spjaða virksemi, so vit hava betri grundarlag at byggja á. Tað ætla vit at halda fram við, soleiðis at tey 100 starvsfólkini á virkinum hava eina framtíð her, sigur Bergur Poulsen at enda.

SVEINUR TRÓNDARSON

# Havsbrún ársins virkið

*Eins og í øðrum londum er eisini føroyska vinnan farin at kjósa ársins virkið í Føroyum. Hetta varð fyrstu ferð gjørt fríggjadagin og Havsbrún var tað fyrsta, sum fekk heiðurin*

Eitt av tiltøkunum á vinnudegnum í Norðurlandahúsinum fríggjadagin var, tá ársins virkið var kosið.

Vinnuhúsið hevði sett eina dómsnevnd at finna egnað evni til heitið og í henni sótu umboð fyri fíggingarstovnarnar, Vinnumálastýrið og Føroya Arbeiðsgevarafelag og hesi funnu við felags stevi skjótt fram til, at ársins virkið skuldi finnast í Fuglafirði.

Í grundgevingini segði Janus Petersen, sum saman við Marneri Jacobsen umboðaði fíggingarstovnarnar í dómsnevndini, at tað rættuliga skjótt gjørdist teimum greitt, at Havsbrún var eitt upplagt evni til ársins virkið.

Ætlanin var upprunaliga, at Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún, skuldi verða við í dómsnevndini, men hann varð koyrdur úr nevndini tá hinir nevndarlimirnir gjørdust greiðir yvir, at virkið hansara fór at vera heilt frammalaga í kappingini um heiðurin.

### Megnað at fylgja við

Í grundgevingunum fyri at velja Havsbrún, sigur dómsnevndin m. a., at Havsbrún hevur megnað at fylgja væl við í kappingini í altjóða høpi, hóast virkið hevur eina tøkniliga tunga framleiðslu, sum næstan er eindømi í Føroyum.

Samstundis hevur virkið alla tíðina ment seg við áhaldandi og stórum nýíløgum.

Framleiðslan hevur øll árini síðan byrjan verið fiskamjøl og fiskalýsi, og rávøran, sum virkið brúkar er útvegað í kapping við virkir, sum viðhvørt liggja betri fyri enn Havsbrún, sigur dómsnevndin.

Hóast umstøðurnar viðhvørt hava verið ímóti, m. a. við, at tilknýti er millum skip og verksmiðjur aðrastaðni, so hevur virkið í Fuglafirði kortini megnað at fylgja við, t. d. við at vísa útlendskum skipum aðrar tænastur, sum tey kunnu fáa samstundis, sum tey leggja veiðuna upp hjá Havsbrún.

### Aðrir marknaðir opnaðir

Sjáldan gongur eftir vild í langa tíð í senn, tí umstøðurnar úti í heimi broyta seg javnan. Í so máta hava vit føroyingar ikki so nógv at siga, tí vit eru bert ein lítil dropi í tí stóra havinum.

Kortini er Havsbrún ikki smokkað burtur ímillum og tað heldur dómsnevndin, er vert at leggja dent á.

– Gjøgnum árini hevur Havsbrún víst, at virkið megnar at umstilla seg til nýggjar umstøður og marknaðir. Tá alingin vaks, fór virkið undir fóðurframleiðslu. At virkið í dag hevur ein marknaðarpart upp á 50 prosent, í kapping við stórar útlendskar kappingarneytar talar fyri seg. Samstundis verður fóður útflutt til Skotlands, so nógv sum tollkvotur Føroya loyva, sigur dómsnevndin.

Harafturat leggur dómsnevndin dent á, at virkið hevur verið við til at fíggjað ein part av alivinnuni og eisini tryggjað, at størsti parturin av alivinnuni enn er á føroyskum hondum.

### Virkið og nærumhvørvið

Tey, sum kenna Havsbrún, vita, at, at virkið hevur stóran týdning fyri ta bygd - ella bý - tað liggur í.

Fuglafjørður og Havsbrún er so at siga óloysilig frá hvørjum øðrum og gongur tað væl hjá Havsbrún, so gongur eisini væl í Fuglafirði.

Tað er ikki bara fiskanøgdin, sum kemur upp á land í Fuglafirði, sum hevur stóran týdning, tí eisini tað, sum fylgir við, at skipini koma at landa, sum skapar ringvirkningar í nærumhvørvinum.

Hvat ársúrslitið viðvíkur hevur felagið einki at smæðast yvir, tí seinastu trý árini hevur úrslitið samanlagt ligið um tær 80 milliónirnar.

Nógvur peningur hevur runnið um kassan í Fuglafirði, tí í sama tíðarskeiðið hevur umsetningurin hjá Havsbrún sníkt seg upp um milliardina - fyri øll trý tíðarskeiðini, væl at merkja - og tað er ikki smávegis peningur. Og tá er tað ikki tikið við, sum virkið annars hevur givið umráðnum at arbeiða við.



*Finnbogi Arge, landsstýrismaður í Vinnumálum, handar Bergi Poulsen, stjóra Á Havsbrún, »steypið«, sum er tekin um, at Havsbrún er ársins virkið 2000*

**Mynd: Jan Müller**